Føroyingar vitjaðu á Islay:

# Arbeiða víðari við alduorku í Føroyum



*Stjórin í SEV, Klæmint Weihe, fremst á myndini, er her á veg út til oynna Islay.*
*Mynd: Signar Heinesen*

**Ferðalagið, sum var og vitjaði á skotsku oynni Islay er komið aftur til Føroya. Ørindini vóru at hyggja nærri at alduorku, og arbeitt verður víðari við møguligari útvinning av alduorku í Føroyum**

ORKA
*Heri á Rógvi*

Møguleikin at útvinna alduorku í Føroyum tykist nú at vera munandi minni ein fjarskotin tanki, enn hann var fyri einari góðari viku síðani.

Eitt føroyskt ferðalag hevur fyri kortum verið í Skotlandi fyri at hyggja nærri at alduorku. Hetta við alduorku ljóðar óivað ógvuliga fremmant hjá mongum. Ì stuttum ber til at siga, at nýtir brim til at gera streym við. Tað eru ymisk sløg av alduorku, men á skotsku oynni Islay verður ein skipan nýtt, har bygt verður ein bygingur við sjóvarmálan, sum útnyttar trýstið, sum brimið gevur. Brimið fær eina turbinu til at mala, og hendan framleiðir so góðan streym.

Tað er kanska heldur ikki mong, sum kennast við oynna Islay. Talan er um ein skotska oyggj, ið liggur einar 100 vestanfyri Glasgow. Oyggin er støddar at sammeta við Sandoynna, og har búgva eini 3.000 fólk. Oyggin er tó mest kend fyri tað nógv whiskey, sum verður framleitt har.

## Nøgdur

Tað var føroyska deildin hjá italska oljufelagnu, Agip, sum skipaði fyri túrinum til Islay. Nú ferðalagið, ið taldi nýggju fólk, er vinnuráðgevin hjá Agip í Føroyum, Ólavur Gregersen, væl nøgdur.

– Vit fóru avstað við tí fyri eyga at kunna okkum um viðurskiftini og kanna eftir, hvørt hetta kundi nýtast í Føroyum. Nú fari vit saman við SEV at hyggja eftir, um hetta er nakað, ið veruliga kann nýtast í Føroyum, sigur Òlavur Gregersen.

Tað varð nevnt frammanundan fráferðini, at Føroyar vóru at meta sum eitt gott pláss fyri at útvinna alduorku, og líkt er til at SEV nú fer at geva hesum møguleikanum eina gjølliga umhugsan.

Á sjálvan túrinum vitjaði ferðalagið bæði á Islay og hjá fyritøkuni, Wavegen, í Inverness. Tað er Wavegen, sum eigur og rekur alduorku á Islay og aðrastaðni. Ferðalagið fekk greitt frá, hvussu skipaninar virka, og sum heild vóru øll rættiliga glað fyri túrin.

– Eg meti, at túrurin var rættiliga væl eydnaður. Hvussu verður víðari er mest upp til teir einstaku at avgera. Agip hevur í løtuni ymsar ætlanir, men einki konkrek fyriliggur enn.



*Soleiðis sær annleggið út, sum verður nýtt til at framleiða streym úr alduorku*
*Mynd: Signar Heinesen*

# Útlendingaøkið føroyskt í 2004

**Løgreglan í Føroyum og ikki danska Útlendingastýrið skal nú taka støðu til allar umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Og samstundis sum løgreglan verður føroysk, skal alt útlendingamálsøkið yvirtakast frá dønum. Hetta verður væntandi í 2004, heldur Høgni Hoydal, varaløgmaður**



ÚTLENDINGAMÁL
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Uppá minni enn ein tíma, avgreiddu Høgni Hoydal, varaløgmaður, og danski útlendingamálaráðharrin, Bertel Haarder, spurningin um, hvussu farast skal fram, tá ið umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi koma frá útlendingum, sum vilja til Føroya at arbeiða.

Allar umsóknir skulu í framtíðini avgreiðast í Føroyum, og embætisfólk í Danmark og Føroyum fara beinanvegin í gongd við arbeiðið at yvirtaka sjálvt málsøkið. Er semja um tað í Føroyum, so kann málsøkið yvirtakast um góð tvey ár saman við løgregluni og dómsvaldinum. Flóttafólkapolitikkurin eigur hinvegin at bíða eftir fullveldistøkuni, heldur Høgni Hoydal.

Higartil hevur løgreglan í Føroyum tikið støðu til allar umsóknir, sum hava við oljuvinnu at gera, meðan allar aðrar umsóknir eru viðgjørdar niðri í Danmark hjá Útlendingastýrinum. Hetta hevur mangan verið ein tung mannagongd, og í summum førum hevur tað tikið sjey mánaðir hjá einum útlendingi at fáa avgreitt umsóknina. Hetta skal í framtíðini ikki taka meira enn tvær vikur. Og nú verður tað løgreglan, sum tekur sær av øllum umsóknum – teimum ið viðvíkja oljuvinnuni og øllum øðrum vinnum.

## Lættir um

Høgni Hoydal er sera vælnøgdur við fundin við danska útlendingamálaráðharran. Fundurin gekk betur enn væntað, og eingin ósemja var teirra millum um umrøddu spurningarnar.

– Vit høvdu ikki sitið í væl meira enn 15 minuttir, so vóru vit samdir um, at løgreglan skal sleppa at taka sær av øllum umsóknum, og vit vóru samdir um at seta embætisfólk at skipa fyri yvirtøkuni av málsøkinum, sigur Høgni Hoydal.

Hann heldur, at tað fer at lætta munandi um, at løgreglan í Føroyum nú skal taka sær av arbeiðs- og uppihaldsloyvunum. Í fjør komu omanfyri 600 umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Nakrar komu til løgregluna – tær sum høvdu við oljuvinnu at gera – meðan allar hinar fóru til danska Útlendingastýrið. Hvussu nógv arbeiðsloyvi vórðu játtaði, veit Høgni Hoydal kortini ikki, tí føroyskir myndugleikar fáa ikki at vita frá Útlendingastýrinum, um ein umsókn fær játtandi ella noktandi svar.

– Tí vita vit í veruleikanum ikki, hvussu nógvir útlendingar komu inn á føroyska arbeiðsmarknaðin í fjør. Vit hava ikki fingið tølini, og hava sostatt ikki haft nakað stýr á gongdini. Men tað fáa vit nú, tá ið løgreglan fær málini um hendi. Nú fer at bera til at siga, hvar tørvur er á arbeiðsmegi, og hvar eingin tørvur er, og soleiðis kunnu vit stýra talinum á inn- og útferðum, sigur varaløgmaður.

## Fyribils loysn

Loysnin, sum Høgni Hoydal og Bertel Haarder samdust um, er ein fyribils loysn. Endaliga loysnin er, at føroyingar yvirtaka sjálvt málsøkið, og hetta arbeiðið fer í gongd sum skjótast. Miðað verður ímóti at fáa arbeiðið liðugt á nýggjárinum. Tá skal embætismannabólkurin, sum fyrireikar yvirtøkuna av løgregluni og dómsvaldinum verða liðugur, og av tí at málsøkini eru tætt knýtt at hvørjum øðrum, er best, at alt verður liðugt í senn. Síðani skulu málini viðgerast í løgtinginum og í ávísum førum í Fólkatinginum, og alt tað praktiska fáast uppá pláss.

– Eg veit ikki, hvussu drúgv tíð gongur, men um ongar politiskar forðingar eru í vegin, og ein komandi samgonga tekur undir við tí, so er ikki óhugsandi, at alt kemur á føroyskar hendur 1. januar 2004, sigur Høgni Hoydal.

## Flóttafólkamálini eiga at bíða

Embætismannabólkurin, sum nú fer í gongd, skal eisini kanna, hvussu føroyingar kunnu yvirtaka flóttafólkapolitikkin, sum er knýttur at útlendingapolitikkinum. Men stendur tað til Høgna Hoydal, so verður flóttafólkapolitikkurin pilkaður burturúr yvirtøkunum og verandi eftir í Danmark.

Ikki fyrrenn Føroyar eru fullveldi, eigur flóttafólkapolitikkurin at koma á føroyskar hendur, heldur Høgni Hoydal. Orsøkin er, at flóttafólkapolitikkurin er eitt sera fløkt og stórt øki, sum í høvuðsheitum er stýrt av altjóða sáttmálum millum sjálvstøðug lond. So leingi Føroyar ikki eru eitt sjálvstøðugt land, verður trupult at seta í verk ein føroyskan flóttafólkapolitikk, sum eins og í øðrum londum er stýrdur av lóggávu, sum tekur støði í altjóða sáttmálum. Ein veruligur flóttafólkapolitikkur krevur eisini, at vit í Føroyum hava eina veruliga tilbúgving, sum kann taka sær av flóttafólkunum. Tað hava vit ikki í dag, og hon tekur nakað av tíð at byggja upp, vísur Høgni Hoydal á.

Embætismannabólkurin, sum verður settur í næstum, skal kortini viðgera og kortleggja spurningin, so Føroyar verða til reiðar at yvirtaka og seta flóttafólkapolitikkin í verk, tá ið tann tíðin kemur.

Eins og við øllum øðrum yvirtøkum, sum liggja frammi í tíðini, eru hesar, sum Høgni Hoydal og Bertel Haarder nú eru samdir um, eisini treytaðar av, at ein komandi samgonga tekur undir við teimum. Er undirtøka ikki fyri teimum, kunnu ætlanirnar hjá Høgna Hoydal lættliga bresta.



# Emma syngur á Giljanesi

**Árliga Giljanestiltakið hjá Lions Club í Vágum verður sunnudagin. Musikalska undirhaldinum fara M'as Blues Band og Ungdómsorkestrið í Vágum at standa fyri**

INNSAVNAN
*Edvard Joensen*

Árliga Giljanes tiltakið hjá Lions Club í Vágum verður sum vant sunnudagin í føstuinngangi, sum er í morgin. Ymiskt er, sum boðið verður, og millum annað verður M'as Blues band at hoyra.

Tær stóru stjørnurnar á føroyska tónleikahimlinum í vetur, Demmus og Olfert og Lennart og Emma, fara á pallin í ítróttarhøllini á Giljanesi klokkan 17.30 seinnapartin.

Ba-bu-ba-bu-ba-bu. Vekk av vegnum.

Tá hevur tiltakið verið opið hálvanannan tíma, tí latið verður upp klokkan 16.00.

Klokkan 20.00 verður aftur tónleikur á pallinum. Tá fer Ungdómsorkestrið í Vágum at spæla.

Giljanes tiltakið er tiltak, sum skal fáa til vega pening, sum Lions so aftur letur víðari til ymisk góðgerandi endamál.

Í ár verður ágóðin av Giljanes tiltakinum millum annað latin til Herbergið hjá Frelsunarheisinum í Tórshavn, til Felagið fyri minnisveik og til Sjúkrabilatænastuna í Vágum.

Av tiltøkum, sum verða í ítróttarhøllini á Giljanesi sunnudagin, kunnu nevnast eydnuhjól, mattombola, vanligt tombola, skjóting, 21-spæl og fiskibrunnur.

Eisini verður matsøla, har selt verður smurt breyð, eins og nýbakaðar vaflur, lagkøka, te og kaffi.

Og tey, sum heldur vilja hava okkurt annað, kunnu fáa ymiskan grillmat og sodavatn.

Til eydnuhjólið verða aftur i ár ymiskir heimagjørdir lutir millum vinningarnar.

Sum dømi um aðrar gávur, Lions Club í Vágum hevur latið, kann nevnast, at dagtilhaldið hjá pensionistunum i Vágum, sum heldur til í húsunum hjá Sørvágs Húsmøðrafelag, hevur fingið nýggja hátalarskipan við teleslyngu.

Pensionistar úr allari oynni hittast týsdag og fríggjadag seinnapart í Húsmøðrafelagshúsinum.



*Emma verður á heimavølli, tá M'as Blues Badn fer at spæla á Giljanesi sunnudagin*

# Listasøla á Glyvrum

**Uppboðssøla av listaverkum hjá politikarum og lokalum skálafjarðarfólki verður í Kappróðrarneystinum á Glyvrum seinnapartin. Umframt verður eisini stór veitsla í kvøld**

FELAGSLÍV
*Edvard Joensen*



*Fleiri kendiur menn hava málað í kappróðrarneystinum á Glyvrum. Málningarnir verða seldir á uppboðssølu í dag*

**Glyvrar:** Kappróðrarfelagið NSÍ hevur fingið lokalar politikarar, bæði landspolitikarar og kommunalpolitikarar, saman við øðrum kendum fólki av Skálafjarðarleiðini at mála hvør sín málning. Málningarnir verða seldir á uppboðssølu í neystinum í dag. Ágóðin skal fara til rakstur felagsins.

Teirra millum, sum málað hava, eru Kári P. Højgaard, løgtingmaður, Torbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, Meinhard Bjartalíð, prestur og Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, umframt fleiri onnur kend fólk av leiðini.

Tilsamans eru yvir 20 málningar og myndir, sum verða seld á uppboðssøluni í nýggja kappróðrarneystinum Inni á Bakka. Uppboðssølan byrjar klokkan 16.30 seinnapartin.

Í samband við, at Kappróðrarfelagið NSÍ alment tekur nýggja neystið í brúk í dag, verður almenn móttøka í neystinum frá klokkan 15.00 seinnapartin.

Áðrenn tað hevur Kappróðrarfelagið havt aðalfund í neystinum. Hann byrjar klokkan 10.00 fyrapartin.

Men stóra tiltakið hjá kappróðrarfelagnum er ikki liðugt, hóast uppboðssølan er liðug, sigur Rannvá Troest á Kunningarstovuni í Runavík, sum stendur fyri tiltakinum saman við Kappróðrarfelagnum.

Klokkan 20.30 í kvøld verður stór almenn veitsla í kappróðrarneystinum. Hilmar Jan Hansen fer at undirhalda undir borðhaldinum, meðan Ragnar Nesstein fer at spæla til dans, sum fer at halda á út á náttina.

# Fyrsti uppstillingarfundur hevur verið

**Sjálvstýrisflokkurin hevur havt fyrsta uppstillingarfund í Eysturoynni. Gamla gardan er á fyribils listanum, eins og okkurt nýtt navn eisini er við. Eisini er onkur burturvilstur sonur vendur heimaftur**

UPPSTILLING
*Edvard Joensen*

Bæði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, og Kári P. Højgaard, løgtingsmaður hjá Sjálvstýrisflokkinum, eru á fyribilslistanum hjá Eysturoyar Sjálvstýrisfelag, sum gjørdur er eftir fyrsta uppstillingarfundin, ið hildin varð hóskvøldið.

Umframt teir báðar er ein gamal kenningur komin aftur á listan. Tað er Lasse Klein, fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaður Sjálvstýrisfloksins, sum hevur verið ein túr í Kristiliga Fólkaflokkinum og vent, síðan hann var sjálvstýrismaður seinast.

Lasse Klein møtti á uppstillingarfundinum hjá Eysturoyar Sjálvstýrisfelag hóskvøldið.

Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, sigur, at fundurin var fjølmentur, og at har vóru bæði kend andlit og eisini heilt nýggj fólk.

– Tað teknar lovandi fyri flokkin, sum hann tekur til.

Á fyribilslistanum, sum gjørdur varð á fundinum, eru seks nøvn, har tey trý kendu eru ímillum.

Kári P. Hjgard sigur, at nevndin í felagnum hevur nú fingið til uppgávu at arbeiða víðari við listanum, sum helst skal vera endaligur, tá annar og kanska triðji uppstillingarfundur verða komandi týskvøld.

Tað er pláss fyri upp til átta fólkum á valevnislistanum í Eysturoy, og Kári P. Højgaard væntar ein sterkan sjálvstýrislista til løgtingsvalið.